Vøllur skiftir navn

Heimavøllurin hjá enska Premier League-felagnum, Wigan, skiftir frá næsta kappingarári navn. Síðani vøllurin stóð liðugur í 1999, hevur hann itið JJB Stadium, men tá komandi kappingarár byrjar í august, skiftir vøllurin navn til DW Stadium. Broytingin er tó ikki so stór, sum hon ljóðar at vera, tí talan er í veruleikanum um, at tað er gamli eigarin av JJB Sports, sum nú hevur fyritøkuna DW Sports. Hann eitur Dave Whelan og er forrestin eisini formaður í Wigan.

Fótbóltsátak í USA

Í juli mánaði fara italsku fótbóltsfeløgini Milan og Inter saman við enska Chelsea til USA at vera við í einari kapping, sum skal varpa ljós á fótbóltin, samstundis sum vitjandi feløgini eisini síggja sær fíggjarligar møguleikar »over there«. Aftur at teimum trimum europeisku feløgunum verður mexikanska Club America við í kappingini, sum kallast World Football Challenge.

Heini toppskjútti – men tapti kortini

Hóast Ajax Keypmannahavn royndi sítt besta, tapti liðið hjá Heina Hanusarson í gjár ein týðandi dyst í botnstríðnum í bestu donsku hondbóltsdeildini. – Nú mugu undur henda, skulu vit verða verandi í deildini, sigur venjarin hjá Heina, Christian Dalmose

HONDBÓLTUR

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Heini Hanusarson, sum síðstu vikuna hevur verið við føroyska manslandsliðnum til teir báðar dystirnar ímóti Sveis í EM-undankappingini, gjørdist toppskjútti hjá Ajax við sjey málum, tá liðið seinnapartin í gjár framman fyri 550 áskoðarum í Bavnehøj-høllini spældi ímóti Nordsjælland Håndbold.

Tað munaði bara ov lítið, tí liðið hjá Heina og teimum tapti 22-27 fyri Nordsjælland, sum var á odda 13-11 í hálvleikinum. Eftir dystin ljóðaði venjarin hjá Ajax Keypmannahavn, Christian Dalmose, sera uppgevandi, tá hann var biðin um at taka samanum:

– Vit taka nakrar skeivar avgerðir og eru ov ótolnir í álopinum. Vit eru ikki nóg klókir og dugnaligir og verða revsaðir av Nordsjælland. Nú skulu undur henda, um vit skulu verða verandi í deildini, segði hann við TV2 Sport, sum vísti dystin beinleiðis.

Fullu ímóti endanum

Kravið í gjár var ein sigur, men soleiðis skuldi ikki ganga. Dysturin var heldur ikki frammanundan roknaður sum nøkur løtt uppgáva, tí mótstøðuliðið, Nordsjælland Håndbold, stríðist av øllum alvi við GOG um at fáa tað síðsta plássið í endaspælinum og mátti tí eisini vinna dystin fyri at røkka sínum máli.

Heini og teir komu betur frá byrjan, og tað tók eitt sindur av tíð hjá Nordsjælland at bróta seg ígjøgnum livandi verjuna hjá Ajax, sum eitt skifti var fimm mál á odda. Men Nordsjælland stríddi seg stútt og støðugt inn í dystin, og longu í hálvleiksstøðginum var leiðslan hjá Ajax burturi.

Hinvegin var ikki leyst og liðugt fyri tað, tí dysturin varð ikki avgjørdur fyrr enn síðstu 10 minuttirnar. Tá hevði Ajax enn eina ferð vunnið seg framum við trimum málum og skuldi havt møguleikar at vunnið tey bæði sera týðandi stigini. Men í staðin kom Nordsjælland fyri seg aftur og vann.

Ímóti endanum skrambla-ði alt saman hjá Ajax, og tí endaði tað við einum heldur størri tapi, enn dysturin annars rættvísgjørdi. Størsta orsøkin var, at Ajax misbrúkti alt ov nógvar málkjansir, og prísurin fyri tað sær nú alt meira út til at vera ein tilvera í næstubestu deildini næsta kappingarár.

Harðar treytir

Annars hevur spælið hjá Ajax síðstu tíðina verið í stórari framgongd, og bæði ímóti FC Keypmannahavn, GOG, Kolding og Skjern hevur liðið hjá Heina Hanusarson spælt sera væl, men hevur tó ikki fingið úrslitini við sær.

Nú kappingarendin nærkast, er støðan tann, at Ajax Keypmannahavn framvegis er aftast í CBB Mobil-liguni við fimm stigum, sum eru trý færri enn TMS Ringsted, sum hevur tríggjar dystir eftir, meðan Ajax bara hevur tveir dystir eftir.

Annar er á útivølli ímóti Århus GF og hin á heimavølli ímóti Team Tvis Holstebro. Men Ajax skal altso hava trý stig burtur úr hesum báðum dystunum, samstundis sum TMS Ringsted einki stig skal hava aftrat. Megnar Ajax hetta, so eru trý stig altso nóg mikið, tí liðið stendur betur í tí, tá tað kemur til innanhýsis uppgerðirnar við TMS.

Heini Hanusarson var í gjár toppskjútti hjá Ajax Keypmannahavn við sjey av teimum 22 málunum, sum liðið fekk í tapta dystinum ímóti Nordsjælland

Endabrestur í talvi leygardagin

Leygardagin verður seinasta umfar í liðkappingini í talvi avgreitt í Klaksvík, tá allar deildir telva á sama stað. Hóast Sandavágur er á odda í 1. deild, eru teoretiskt møguligt hjá trimum øðrum liðum at vinna føroyameistaraheitið

TALV

Hilmar Jan Hansen
einslistir@kallnet.fo

Stendur púra á jøvnum, tá liðkappingin í 1. deild endar leygardagin, skulu umdystir til – fyrst við kviktalvi, og um tað framvegis stendur á jøvnum, so við snartalvi

Sum vanligt, endar liðkappingin í talvi við einum ordans endabresti, tá øll talvini í øllum deildum verða telvað á einum og sama stað, sum hesa ferð er fimleikarhøllin í Klaksvík. Byrjað verður leygarmorgunin klokkan 11.30, og Talvsambandið hevur heitt á allar telvarar um at møta í góðari tíð, so byrjast kann stundisliga.

Serliga í 1. deild er ein teoretiskur møguleiki fyri, at endin kann gerast spennandi, hóast ásannast má, at Sandavágur liggur so mikið væl fyri, at tað skal vilja sera illa til hjá oddaliðnum, eydnast ikki at vinna so mikið, at tað røkkur til meistaraheitið.

Støðan í 1. deild undan seinasta umfarinum er tann, at Sandavágur er á odda við 23 stigum, Klaksvík 1 hevur 20½ stig, Havnin 1 hevur 20 og Vestmanna 1 hevur 19 stig. Leygardagin skal Sandavágur 1 telva ímóti Havnini 1, meðan hinir báðir dystirnir eru Vestmanna 1-Klaksvík 1 og Havnin 2-Klaksvík 2.

Reglur fyri umdyst

Av tí støðan í 1. deild kann gerast tann, at meira enn tað eina liðið endar ovast við flest stigum, samstundis sum somu lið eisini kunnu enda við somu dystarstigum, hevur kappingarleiðarin skorið út í papp, hvussu reglurnar eru, um tað heila endar á jøvnum.

Endar tað so javnt, má umdystur til fyri at finna endaliga vinnaran, og tá telva liðini fyrst ein dyst við kviktalvi. Stendur framvegis á jøvnum verður enn ein dystur, men hesa ferð við snartalvi, og nú verður hildið á at telva, til annað liðið vinnur.

Reglurnar fyri annað og triðja pláss eru tær somu, um tað eisini skuldi staðið á jøvnum har, so lættari skal vera at avgreiða heiðursmerkini, nú alt er samlað á einum stað í hesum seinasta umfarinum í liðkappingini.